# IKKE!

Rithøvundur: Gro Dahle (Noreg)
Myndprýðari: Svein Nyhus (Noreg)
Cappelen Damm, 2022

Í uppskoti til Barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2023

Søgugongd: Í Ikki! hitta vit Tiki, sum er djørv, glað og forvitin, so foreldrini at enda royna at ræða Tiki við øllum, sum tey halda vera vandamikið. Tiki sleppur ikki at klintra, hon skal ansa sær fyri øllum og als ikki eta sukur. Tiki verður bangin og byrjar at minka. Samstundis eru foreldrini fegin um, at Tiki er vorðin so lítil, at tey nú kunnu verja hana móti øllum vandum. Hvussu ávirkar hetta Tiki?

Evni: forvitni, foreldur og børn, vandi, menning, reglur, ófriður, ábyrgd




ISBN 978-952-7572-45-0

## Samtalur og virksemi:

### HYGG OG LES saman við teimum yngstu:

**Hyggið at myndunum saman. Hvussu síggja vit út, tá vit eru glað, bangin ella tá vit eru ill? Kanst tú vísa ymisku kenslurnar við andliti og kroppi?**

### TEY YNGRU

**1. Hygg at permuni. Hvat halda tit, bókin snýr seg um? Hvat gera persónarnir á permuni?**

**2. Lesið tríggjar tær fyrstu síðurnar og hyggið at myndunum. Hvørjum persónum hitta vit? Hvat hendir í søguni?**

**3. Tiki ger nógvar rørslur í bókini. Hyggið at síðstu opnuni og lesið um rørslurnar, sum Tiki ger. Roynið rørslurnar og vísið hvørjum øðrum. Hvussu sær tað út, tá mann klintrar, flákrar ella etur eina vaflu sum er dottin niður á vegin? Lesið tekstin av nýggjum og finnið uppá nýggjar rørlsur.**

**4. Hvørjar rørslur kunnu vera vandamiklar at gera, um mann ikki ansar sær? Kjakist í bólki.**

### MIÐLINGAR

**1. Hyggið at myndunum í bókini. Hvørjar litir síggja tit? Hví halda tit, at myndprýðarin hevur valt hesar litirnar? Hvørja mynd hefta tit tykkum við og hví?**

**2. Hvat dámar Tiki at gera, og hvat dámar foreldrunum at gera?**

**3. Hvat er tað hættisligasta og óhættisligasta, tit finna í bókini?**

**4. Hvussu kennist tað í kroppinum, tá tú hevur hug at gera okkurt spennandi, og ein vaksin sigur nei? Kanst tú koma í tankar um eina tílíka hending?**

**5. Skrivið eina yrking, har hvør regla byrjar við orðinum "ikki".**

**6. Á baksíðuni á bókini stendur, at Tiki er djørv. Taka tit undir við tí? Hví? Hví ikki?**

**7. Hvat halda tit, Tiki ger, tá bókin er liðug?**

### TEY STØRRU BØRNINI

**1. Hvat hildu tit um bókina? Var nakað, sum var trupult at skilja? Finna tit mynstur og líkleikar úr øðrum søgum?**

**2. Hví halda tit, at Tiki byrjar at minka?**

**3. Hvat halda tit, rithøvundurin meinar við í síðstu reglu í bókini, har hann sigur, at "Tiki skal bera seg sjálva"?**

**4. "Ikki" er eitt orð, sum foreldur Tiki ofta brúka. Hví halda tit tað? Hvussu halda tit, at tey hava tað?**

**5. Um tit skuldu givið bókini eitt annað heiti, hvat skuldi tað so verið?**

**6. Hyggið at persónunum í bókini og hvussu evni, litir og mynstur koma til sjóndar. Teknið ella málið eitt mynstur, sum sýnir ræðslu, og eitt, sum sýnir gleði.**

---

**LESIÐ EISINI:**

**Tá Mumbo Jumbo varð risastórur eftir Jakob Martin Strid.**

**Om du möter en björn eftir Malin Kivelä, Martin Glaz Serup og Linda Bondestam.**

---

## MÁLBITIN

# "Nei"

| svenskt | danskt | norskt | íslendskt | føroyskt | grønlendskt | finskt | norðursámiskt |
| --- | --- | --- | --- | --- | --- | --- | --- |
| **Nej** | **Nej** | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Naamik** | **Ei** | **Ii** |



**Deilið myndir av tykkara lesiløtum við #nordiskabokslukaren!**